# Fjørukrógvin í Vestmanna opin


*Í nýggju matstovuni, Fjørukrógvin, er pláss fyri 70 fólkum at sita, og um vikuskiftið verður ein serlig bátastevnumatskrá*

**Vestmanna Tourist Centre er nú liðugt og letur upp alment um vikuskiftið**

FERÐAVINNA

Tey sum ætla at vitja í Vestmanna um vikuskiftið, meðan bátastevna er, hava eisini møguleikan at vitja nýggju ferðavinnumiðstøðina Inni á Fjørð. Handilin og kunningarstovan, sum millum annað skipar fyri útferðunum hjá Sjóferðum (Skúvadal Spf) undir Vestmannabjørgini, lótu upp fyri tveimum vikum síðani. Og nú er so eisini klárt at lata sjálva matstovuna upp.

Í matstovuni kunnu 70 fólk sita, og ætlanin er at hava eina serliga bátastevnu matskrá nú um vikuskiftið, siga fyrireikararnir.

Kommunan hevur seinastu dagarnar asfalterað økið uttan fyri sjálv húsini og gomlu skúrarnir, ið stóðu har eru burtur, so økið við bátahylin er ikki til at kenna aftur.

Bygningurin hjá Vestmanna Tourist Centre er góðar 250 fermetrar.


P/F ALMA
MASKINVERKSTAÐUR & SMIÐJA
Munters
THE HUMIDITY EXPERT

Munters produktini avfukta kølirúm, frystirúm og aðrar goymslur, produktiónshølir, teknikkrúm, turkirúm, garagur, loftsrúm og kjallarar við kondensrupuleikum, eins og onnur hølir har fukt ella kondens kann gera skaða, ella eitt turrari umhvørvi er eitt ynski ella krav.

Á Hjalla 15 – Boks 1338 – FO 110 Tórshavn
Tlf. 31 58 90 – Fax. 31 35 00 – mail: henrik@alma.fo




# Nósabarnaprix 2005 í nýggjum hami

**Børnini, sum ætlað sær við í Nósabarnaprixið, skulu fyrst gjøgnum eina upptøkuroynd, sum verður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði leygardagin**

TÓNLEIKUR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Nú stendur Nósabarnaprixið aftur fyri durunum, og væl umtókta sangkappingin fyri børn hevur verið so væl umtókt seinnu árini, at fyrireikararnir hesaferð hava gjørt av, at ein upptøkuroynd skal vera fyri kappingina.

Áður hava nógv fleiri børn, enn pláss hevur verið fyri í kappingini, teknað seg til, og í ár verður roynt við ein úttøkuroynd, har tey, sum duga best, at syngja verða vald til kappingina.

**Vinnarin fær 10.000 kr.**

Upptøkuroyndin verður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði leygardagin frá kl. 14.00 til 19.00, og tá kunnu øll børn millum 7 og 14 ár royna seg.

Tað er ikki neyðugt at hava nakran tónleik við sær, tí Kim Hansen situr við klaverið og spælir tað, børnini ynskja. Eisini verða trý fólk, sum hava drúgvar royndir innan sang og tónleik, sum velja út tey 30 børnini millum til kappingina.

Trý innleiðandi umfør verða hildin í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, og sjálv finalan verður á varmakeldustevnu.

Vinnarin av Nósabarnaprixnum 2005 fær 10.000 krónur, nummar 2 fær 3.000 krónur og nummar 3 fær 1.500 krónur.

Harafturat verður ein fløga gjørd, har øll børnini, sum koma í finaluna, syngja ein sang.

Fyrsta kappingin í Nósabarnaprixnum verður tann 11. juni.


www.import.fo





við
ISO 9001
tryggjaðari framleiðslu og eini
DVC góðkenning
av tilfarinum, so veit tú hvat tú keypir
- hvørja ferð og í øllum tilfarinum

Vit kunnu bjóða vindeygu og hurðar framleidd úr t.d.:
Kjarnutræ, eik, lærk, mahogny, plast, træ/eik, alu/træ v.m.





v/ TONI DAM · Postboks 3070
FO-110 Tórshavn · Faroe Islands
Tel 565 565 · Fax 321 421
import@import.fo · www.import.fo
import.fo


# Besta songrøddin skal finnast

**Kappingin um at gerast Ársins Songrødd er í ár skorin niður til tvey innleiðandi umfør og eina finalu. Í mesta lagi 20 sangarar sleppa við til kappingina, sum í ár verður hildin í Fuglafirði**

TÓNLEIKUR

*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

So er tíðin aftur komin til at finna Ársins Songrødd. Nógvar føroyskar songstjørnur eru gjøgnum tíðina sprotnar úr hesi kapping, og fleiri av teimum hava síðani funnið sær vegin fram á stóra tónleikapallinum - bæði her heima og úti í stóru verð.

Tvey undanumfør eru á skránni í ár, og verða bæði hildin í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Sjálv finalan verður eisini í Fuglafirði, har umstøður og karmar til slík tiltøk eru framúr góð.

Í mun til seinasta ár verður nú ein langur listi við fleiri hundrað løgum at velja ímillum. Listan finnur tú á www.songroddin.com.

**Bert pláss fyri 20**

Í ár er tó einans pláss fyri 20 luttakarum, so tað ræður um at tekna seg til kappingina skjótast gjørligt. Hetta kann gerast inni á heimasíðuni, har tað eisini ber til at finna reglar og ymiskt annað um sjálva kappingina. Tekningin fer fram inni á www.songroddin.com, og heldur áfram til 26. mai.

Á sjálvum pallinum verður Ragnhild Ellingsgaard vertur til tiltakið, meðan Elin í Stórustovu skipar fyri undirhaldinum á DJ-Showinum, sum verður aftaná sjálva kappingina.

Fyrsta innleiðandi umfarið verður 11. juni, og finalan verður tann 25. juni.